

## VW Caddy 1.9 TDI vøruvognur til sølu

VW Caddy 1.9 TDI við 104 hk. Bilurin er frá 2004 og hevur koyrt 41.000 km.

Ógvuliga væl hildin – hevur verið til øll eftirlit.

Hevur CD/radio, atskilt vørurúm og summardekk.

**Prísur: 120.000 kr. v/mvg**

**Tlf. 31 88 77 ella 22 19 10**

## DJÓRAHANDILIN søkir starvsfólk

**Tann, ið settur verður í starv, skal hava kunnleika og áhuga fyri djórum.**

**Vit vænta:**

- At tú ert mininum 17 ár.
- At tú ert vinarlig/ur, fyrikomandi og kann vegleiða og avgreiða viðskiftafólkum okkara, eftir upplæring.
- At tú ert samvitskufull/ur, møtir til tíðina og kann arbeiða sjálvsstøðugt.

Reingerð av handli og vasking av akvarium og búrum er ein partur av arbeiðinum.

Arbeiðstímar: umleið 20 tímar um vikuna – seinni er møguleiki at fara upp í tíð.

Arbeiðstíð: 15.00 – 18.00 vikudagar og 10.00 – 14.00 leygardagar, umframt avloysing í feriunum.

Skrivlig umsókn við prógvum, verður at senda til:

DJÓRAHANDILIN
AKVARIUBÚÐIN
POSTBOKS 3274 · FO - 110 TÓRSHAVN

## Pakkifólk

Søkt verður eftir fólki til pakkideildina at byrja skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja, ella støkka inn á gólvið og spyrja eftir Bent.

Grón síðan 1906

**BAKARÍIÐ GRÓN**
**Hoyvíksvegur 65**
**Tlf. 23 62 14 / 31 21 61**
**Postboks 1048**
**110 Tórshavn**

## Søkt verður eftir maskinfólki til fóðurframleiðslu

Havsbrún er eitt av stórstu og tøkniliga mest framkomnu framleiðsluvirkjunum í Føroyum við 90 starvsfólkum og einum umsetningi uppá góðar 500 mill. kr árliga. Havsbrún framleiðir fiskamjøl og lýsi á Mjøldeildini, og alifóður á Fóðurdeildini. Størri helmingurin av framleiðsluni fer til útflutnings.

Vegna øktar arbeiðsuppgávur, søkja vit eftir fólki til fóðurframleiðsluna.

**Vit rokna við at tú –**

- Er útlærdur smiður, handverkari ella líknandi.
- Hevur gott tekniskt innlit og áhuga fyri maskintøkni.
- Er bæði sjálvstøðugur og fjøltáttaður.
- Hevur góð samstarvsevni.
- Er sinnaður at arbeiða í vaktarskipan.
- Er eldhugaður, tolin og ágrýtin.

**Er tað so, so kunnu vit bjóða –**

- Eitt spennandi tekniskt og dynamiskt arbeiðsumhvørvið, har tú kemur at taka lut í fóðurframleiðsluni,viðlíkahaldsarbeiði v.m.
- Eitt gott og trygt arbeiðspláss.
- Møguleika fyri góðari løn eftir nærri avtalu

Ljóðar hettar áhugavert fyri teg, so send eina umsókn beinanvegin, sum bræv ella teldupost til:

**pf Havsbrún**
Merki: »Umsókn maskinfólk«
P.O. boks 81
FO-530 Fuglafjørður
Tlf 41 44 00
Fax 41 44 01
Epost: ode@havsbrun.fo

HAVSBRÚN



## BMW 520i til sølu

Bilurin er 3½ ár og hevur koyrt 67.000 km. Hann er sum nýggjur bæði uttan og innan. Hevur eisini væl av eykaútgerð.

Má síggjast og roynast.

Ring 332569 ella 283569 og fá meiri at vita.

Almanna- og Heilsumálaráðið

## Ráðstevna um fólkaheilsu “Frá hugskoti til veruleika”

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, skipar mikudagin 16. mai 2007 fyri eini ráðstevnu um fólkaheilsu undir heitinum “Frá hugskoti til veruleika”.

**Endamál**
Endamálið við ráðstevnuni er, at avvarðandi partar skulu koma við ítøkiligum uppskotum um, hvat skal gerast til tess at røkka málunum, sum eru sett í fólkaheilsuætlanini hjá landsstýrinum. Tey raðfestu málini eru: Rørsla, kostur, royking og rúsdrekka- og rúsevnismisnýtsla.

**Skrá**

| | |
|---|---|
| **Kl. 08:00-08:15** | Landsstýrismaðurin bjóðar vælkomin |
| **Kl. 08:15-10:00** | Framløgur innan tey fýra raðfestu økini:<br>Bólkur 1: Rørsla: Hvussu økja vit um likamsvirknið hjá føroyingum sum heild?<br>Bólkur 2: Royking: Hvussu minka vit roykingina?<br>Bólkur 3: Kostur: Hvussu fáa vit føroyingar at eta heilsugóðan kost?<br>Bólkur 4: Rúsdrekka- og rúsevnismisnýtsla: Hvussu kann hetta minkast? |
| **Kl. 10:00-10:30** | Steðgur |
| **Kl. 10:30-12:00** | Bólkaarbeiði |
| **Kl. 12:00-13:00** | Steðgur |
| **Kl. 13:00-14:30** | Framløgur av bólkaarbeiðnum og kjak |
| **Kl. 14:30-14:40** | Steðgur |
| **Kl. 14:40-15:00** | Fyrilestur – “Fólkaheilsa og lívsgleði” |
| **Kl. 15:00-15:30** | Kjak |
| **Kl. 15:30-16:00** | Landsstýrismaðurin tekur saman um |

**Tíð og stað**
Ráðstevnan verður í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum mikudagin 16. mai 2007, kl. 8:00 – 16:00.

**Tilmelding**
Tilmelding til ráðstevnuna fer fram í Almanna- og heilsumálaráðnum á t-post: kag@ahr.fo. Vinarliga boða frá luttøku í seinasta lagi mánadagin 14 mai. Heitt verður á luttakararnar um at boða frá, í hvørjum av teimum fýra bólkunum teir ynskja at luttaka í.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN • TELEFON 30 40 50
TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHS@AHS.FO

## Goymslufólk

**Søkt verður eftir fólki til goymsluna, at byrja skjótast gjørligt.**

Skrivlig umsókn innan **1. juni 2007**

**Bilasølan**
Vegurin langi · tlf 35 97 00 · www.bilasolan.fo